# Spinn er partapolitiskir

**Nýggja og modernaða hugtakið spinn er als ikki eitt nýtt hugtak í føroyskum politikki. Hvør flokkur – og harvið øll landsstýrisfólk – hava jú seinastu 60-70 árini havt ein heilan fjølmiðil í part gjøgnum partapolitisku bløðini, ið gjørdu alt tað, sum teir nútímans spunasmiðirnir gera í dag: At tekna glæstrimyndir av "sínum" flokki og "sínum" politikarum. At fjala og krógva tað skeiva og ringa. Tað heldur Høgni Hoydal, løgtingsmaður og fólkatingsmaður. Lesið fjórða part av greinarøð um politikk og fjølmiðlar**



## Samrøða




**Páll Holm Johannesen**
pallurin@hotmail.com


– Mín høvuðsniðurstøða um politikk og fjølmiðlar í Føroyum er rættiliga greið: Meginparturin byggir á mytur, fordómar og ósannleikar, sum ongantíð verða eftirkannað.

Hann hevur roynt at sita báðumegin borðið. Fyrst sum ágrýtin fjølmiðlamaður í Sjónvarpi Føroya, og síðan 1998 hevur Høgni Hoydal verið ein av fremstu politikarum í Føroyum. Hann er heldur ikki bangin fyri at loysa frá posabandinum.

- Vit vita, at um Javnaðarflokkurin ikki hevði sitið í stjórn, so var tað á forsíðuni í Sosialinum, at tey sjúku fáa ikki pláss á Hotel Tórshavn eru "offur á fullveldisaltarinum". Nú er søgan í Sosialinum og á Portalinum vinklað soleiðis: "Tey sjúku fara nú at fáa tað nógv betri."

### Sjúrður eingin spunasmiður

*Tú hevur persónliga havt spunasmið/samskiftisfólk at hjálpt tær sum politikari. Hvussu ávirkar hetta títt politiska arbeiði?*

– Nógv hava íspunnið ta mytuna, at Sjúrður Skaale arbeiddi sum spunasmiður hjá mær í Tinganesi. Tað gjørdi hann ikki. Hann arbeiddi fyrst og fremst fakliga við at skriva Hvítubók og at leggja útgávur og kunning til rættis um fullveldismálið, ið jú varð samtykt á Føroya Løgtingi.

Hevði Sjúrður verðið settur sum spunasmiður, so hevði nógv av tí, ið gjørt varð, verið gjørt bæði professionellari og nógv betri sum heild. Men hann fekk – tíverri – ikki ta uppgávuna. Tað sama kann sigast um arbeiðið hjá Sjúrði í Norðuratlantsbólkinum. Hann gjørdi eitt sera stórt fakligt arbeiði sum samfelagsfrøðingur við frágreiðingum og útgávum. Hann var sum ein sjálvstøðugur persónur og ikki ein ørindadrongur. Tíbetur.

Fólk vilja helst siga til hesa útlegging: "Nei, nú tvætlar Høgni og manipulerar" Tjóðveldisflokkurin hevur stýrt fjølmiðlunum!"

Men so er sanniliga illa arbeitt. Tað er bert at blaða aftur í bløð, ella leita í útvarpi og sjónvarpi seinastu 7-8 árini. Ein long røð av negativum søgum, klandri og gølum um bæði Tjóðveldisflokkin og um fullveldismálið.

*Bankar, aðalráð og fakfeløg hava í dag sett samskiftisfólk í starv. Væntar tú, at hetta rák vindur upp á seg, og politiskir flokkar eisini fara at seta samskiftisfólk/spunasmiðir í fast starv?*

– Ja avgjørt. Og politiskir flokkar fara at seta spunasmiðir beinleiðis á floksskrivsstovurnar – serliga teir, sum hava nógvan pening. Eisini fara løgmaður og landsstýrisfólk at seta persónligar spunasmiðir, eins og núverandi løgmaður hevur sett nærum alt embætisverkið at vera spunasmiðir fyri seg persónliga. Men hetta er sum so ikki nakað nýtt rák í politiskum flokkum ella í landsstýrinum. Føroyar hava jú ongantíð havt eina frælsa pressu. Hvør flokkur – og harvið øll landsstýrisfólk – hava jú seinastu 60-70 árini havt ein heilan fjølmiðil í part gjøgnum partapolitisku bløðini. Hvør flokkur sítt blað, sum so aftur eisini fakfeløg og ymsar fyritøkur stuðlaðu og fingu pláss í.

Hesi bløð vóru – og summi eru enn – reinir propagandasentralir, ið gjørdu alt tað, sum teir nútímans spunasmiðirnir gera í dag: At tekna glæstrimyndir av "sínum" flokki og "sínum" politikarum. At fjala og krógva tað skeiva og ringa. At pynta veruleikan til frama fyri sín flokk. Og at leypa á politisku kappingarneytarnar.

So hetta er ikki nakað nýtt. Nú verður bert lagt eitt nýtt lag – eitt nýtt jaður – av fólkum við somu uppgávum, sum partapolitska pressan altíð hevur havt, sett úti á floksskrivstovunum, í aðalráðum, í fyritøkum og hjá feløgum. Tey eru betur lærd og fáa hægri løn – men tey eru at samanbera beinleiðis við ta gomlu partapolitisku pressuna. Tó er munurin, at hesir nýggju spunasmiðir kunnu skifta ímillum arbeiðsgevarar – alt eftir lønar- og arbeiðstreytum, meðan fyrr vóru spunasmiðirnir floksloyalir og bundnir at tí.

*Hvør, metir tú, setir dagsskránna í*

## Fakta

**Navn:** Høgni Hoydal
**Aldur:** 40 ár
**Starv:** Løgtingsmaður og fólkatingsmaður
**Útbúgving:** Kandidatur í samskifti og søgu
**Starvsroyndir:** Landsstýrismaður, løgtingsmaður og fólkatingsmaður. Eisini roynt seg sum tíðindafólk í sjónvarpinum og dekkari

Sosialurin